# Ólavsøkuróðurin skal bjarga róðrarárinum

**Kappróður: Hóast spenningurin ikki er so stórur í øllum FM kappingunum, so legði Vestanstevnan upp til sera spennandi kappingar í flestu róðrunum á Ólavsøku**

EYKAVINNINGURIN
*Jóannes Hansen*

Í tveimum kappingum er tað púra avgjørt. 8–mannafarið Ørvur hjá Havnar Róðrarfelag og 6–mannafarið við kvinnum, Gongurólvur, eisini hjá Havnar Róðrarfelag, hava ognað sær so mikið nógv stig, at eingin kann røkka teimum. Hesir bátarnir eru sannførandi FM vinnarar.

Men í fleiri øðrum kappingum er spenningur í. Serliga spennandi er kappingin millum 5–mannaførini við gentum. Blikur av Argjum hevur 31 stig, og teir báðir bátarnir hjá Havnar Róðrarfelag, Drekin og Sílið, eru honum á baki við ávikavíst 30 og 28 stigum.

10–mannaførini eru bara fýra í tali, og har er greitt, at tað hvørki verða vestmenningar ella havnarmenn, sum fara at vinna FM. Vestmenningurin og Havnarbáturin hava annars ofta kappast um meistaraskapin, men tað hevur ikki hilnast væl hjá teimum í ár. Havnarbáturin vann á Norðoyastevnu, og tað kundi boðað frá, at teir fóru at vera frammarlaga, men síðani hevur tað ikki gingið eftir vild. Vestmenningur hevur ongantíð í ár megnað at bjóða av í kappingini um fremsta plássið, og tað er longu greitt, at hann verður aftastur í FM kappingini.

Stríðið stendur millum Eysturoyingin og Nólsoyingin. Eysturoyingur, sum var fyrstur á Fjarðastevnuni, á Sundalagsstevnuni og á Varmakeldustevnuni, er best fyri í FM stríðnum. Hann hevur 36 stig. Um tað skal eydnast Nólsoyinginum, sum var fremstur á Jóansøku og aftur á Vestanstevnuni at vinna, so skulu teir vinna á Ólavsøku, og so skal Eysturoyingur ikki verða nummar tvey. Nólsoyingurin hevur 33 stig. At Havnarbáturin og Vestmenningurin á Ólavsøku fara at vísa vilja at gera um seg og harvið at røkka úrsliti, sum kann bera betri eftirmæli um hetta róðrarárið, enn tað higartil er lagt upp til, sigur seg sjálvt.

Í kappingini millum dreingjamanningarnar er FM heitið ikki heilt avgjørt, men tað skal vilja heilt illa til hja Sílinum, sum var avgjørdur vinnari í Sandavági, um tað ikki skal eydnast teimum at endurvinna meistaraheitið. Sílið er fremst við 38 stigum, meðan vestmannadreingir umborð á Havfrúnni hava 33. Eingin annar kann røkka Sílinum, og tað skal nógv til hjá Havfrúnni. Undanfarnu ferðirnar hava hesir báðir bátarnir kappast um fremsta plássið, og tað er eingin vandi fyri meistaraheitinum hjá Sílinum, um teir ikki skuldu vunnið. Sílið verður meistari, sjálvt um Havfrúgvin vinnur, og Sílið ikki verður meiri enn nummar fýra.

Smyril úr Vági hevur 36 stig, og hann er nógv best fyri í FM kappingini. Jarnbardur, sum vann á Jóansøku og aftur á Vestanstevnuni, er fýra stig aftanfyri. Eingin annar hevur møguleika at gerast meistari. Men í Sandavági vóru ábendingar um, at fleiri aðrar manningar kunnu bjóða av í kappingini um sigurin á Ólavsøku. Her verður hugsað um Páll Fanga, sum vann á Fjarðastevnuni, og sum var bara eitt evarska lítið sindur aftanfyri Smyril í Sandavági og kanska eisini um Stráluna og Sølmund, sum leingi vóru væl við í Sandavági.

## Stórt plástur

Róðrarárið er rættuliga farið at líða. Sum omanfyri nevnt er FM kappingin so at siga avgjørd í fýra kappingum. Fleiri manningar, ið høvdu roknað við, at nógva venjingin, sum síðani tíðliga í ár er løgd í, skuldi bera fyrstu pláss, steyp, stig og FM heiti við sær, hava onkra ferðina kent seg vónbrotnar. Tað vil so vera.

Men tíbetur er tað soleiðis, at ólavsøkan bíðar. Eitt gott úrslit og sigur í ólavsøkuróðrinum hjálpir væl. Róðrarfólk siga, at einki er sum at vinna á Ólavsøku. Tað er sum at vinna eitt eyka FM heiti. Fólk sæst og hoyrist framvið øllum róðrarteininum. Tað ber eyka motivatión við sær. At vinna FM og ikki at vinna ólavsøkuróðurin ber ikki somu FM kensluna við sær, sum tað ger, um bæði FM og ólavsøkusigurin koma til høldar, sigur rógvarar.

Tað er ikki so sjáldan komið fyri, at bátar hava vunnið, sum hava ligið dygst undir Molanum. Har rógva ikki teir bestu bátarnir – teir liggja í miðjuni – men tey eru fleiri, sum hava sagt, at tað er ákoyringarnar frá áskoðarunum, sum geva eyka megi og úthaldni.

Róðrarteinurin á Ólavsøku er styttri, enn hann er í øllum hinum kappingunum. Tí ræður um at venja startspurtin serliga væl. Lunnaróðurin er lítil og eingin, á Molanum verða føturnir aftur settir í bekk, og so er talan um ein veldugan endaspurt á ólavsøkuróðrinum og kappróðrarárinum sum heild.

## Rúm fyri øllum

Fasti starturin á ólavsøku rúmar fimtan bátum. Um luttøkutalið í einari kapping fer upp um hetta talið, verður neyðugt við innleiðandi róðrum, men hetta verður ikki aktuelt á Ólavsøku í ár.

Íalt vóru 90 bátsmanningar meldaðar til FM kappróðurin í ár. Men í fyrstu FM kappingunum var talið niðanfyri hálvt hundrað. So við og við eru onkrar manningar komnar afturat. Eitt nú hava útisetar, sum eru heima í summarfrí, mannað onkrar bátar.

Tað er ikki nógv avlopspláss, tá ið tað verður róð kapp á Ólavsøku, men um róðursmenninir røkja sína uppgávu til fulnar, so eigur tað at ganga. Tá fimtan bátar kappast, verður roknað við, at hvør báturin hevur ein geira upp á fimtan metrar, og harafturat eru seks metrar hvørju megin samlaða róðrarøkið. Á Vestanstevnuni var største kappingin tann millum 5–mannaførini við gentum. Har luttóku trettan maningar.

Sambært kappingarskipanini boðaðu 22 gentumanningar frá luttøku í hesum róðrarárinum. Men tað er eingin vandi fyri ovurluttøku á Ólavsøku. Reglurnar siga, treytin fyri luttøku í ólavsøkuróðrinum er, at báturin skal hava luttikið í minst trimum av undanfarnu seks FM róðrunum.



Kappingin hjá gentunum er sera tøtt

Mynd: Álvur Haraldsen





Teir umborð á Smyrli eru útlúgvaðir, tá teir koma á mál

Mynd: Jens Kr. Vang




